

Stór uppboðssøla av gomlum lutum

Fyri fyrstu ferð verður stór uppboðssøla av antikvariskum lutum í Føroyum. Yvir 300 borð, stólar, málningar, vasar og annað verða send úr Danmark og skulu seljast í Ítróttarhøllini á Hálsi.

KATRIN PETERSEN

Í teknirøðum sæst ofta, at er ein á uppboðssølu, kann ein ikki klóra sær í nakkanum – áðrenn tú veit av, hevur tú boðið 5000 krónur upp á ein blómuvasa. Men hesum nýtist tú ikki at óttast fyri, sætlar tú í ítróttarhøllina á Hálsi 21. juni.

– So ringt er tað nú ikki – tað sæst sum oftast tyðiliga, um fólk bjóða upp á lutin ella tey bara klóra sær í nakkanum, sigur Bjørn á Heygum, sum skal standa fyri uppboðssøluni.

Keypir deyðsbúgv

Í øðrum londum eru fyritøkur, sum liva av at uppkeypa innbúgvið hjá avdeyðum og selja tað aftur. Henda fyritøkan, sum kemur til Føroya, er donsk. Hon varð brukt, tá Cafe Natúr skuldi innrættast.

– Eg haldi, hetta er fyrstu ferð, hetta verður roynt í Føroyum – ið hvussu er ikki í so stórum vavi. Men nú fáa vit so at siggja, um føroyingar fara at keypa nakað, sigur Bjørn á Heygum.

Lutirnir, sum verða til sølu, eru ymsir til aldurs. Bjørn á Heygum metir, at teir eru um hundrað ára gamlir og nakað yngri. Borð, skáp, kommodur, spegl, teppi, lóssakrúnur og postalínsfigurar verða at siggja tveir dagar undan søluni.

Uppboðshaldarin heldur sjálvur lutirnar vera áhugaverdar.

– Eg haldi, tað hevði verið stuttligt hjá fólki at komið og hugt, um tey ikki ætla at keypa nakað.

– Eg veit ikki, um føroyingar duga við at keypa lutir soleiðis – ið hvussu er hava vit ikki tradisjón fyri hesum. Útlendskir keyparar duga ofta væl at vurdera, og vita nógv um lutirnar.

Sjálvur hevur Bjørn á Heygum ofta hildið uppboðssølur – tó ikki við so nógvum lutum sum á hesari.

Brøv til Dimmalætting

Oljuráðstevna

Nú um dagarnar var storfingin sjarmuoffensivur frá einum norskum oljufelag í Norðurlandahúsinum.

Tað er ikki so langt síðan, norðmenn voru her á landi í nakað somu ørindum, men tá høvdu teir táverandi krunprinsin við. Ørindini ta ferðina voru at fáa okkum at byggja luxus skip. Tann, sum minnist og kennir úrslitið av tí ferðini, hevur helst hug at krympa tærnar í skónum.

Eg hevði leitað mær til Havnar hendan dagin og má siga, at bliðskapurin frá norðmonnunum var óforur, men skjótt kom eg eftir, at vitjanin var ikki gjørd við nøkrum øðrum endamáli enn at tjena mammon, og tað duldu teir heldur ikki. Hetta eru sera dugnaligir, knallharðir vinnulivsmenn, og tað var sera áhugavert at siggja, hvat teir hava meginað.

Tað, sum undraði meg stórliga var, at hvat í himmalsins navni allur hesin skarin av almennum skrivstovufólki gjørdi har, har sást tú almennar stjórar við fylgi sína og siggja alvorlig út, meðan teir royndu at fjala geispini.

Eg vil meta, at 90 prosent av luttakaranum, «ið sótu har», voru fólk við fullari almennari løn í tveir dagar og tað við sjálvum løgmanni á odda.

Tað hava longu verið fleiri slíkar raðstevnur, og kenni eg føroyingin rætt, verður eitt ótal afturat, aðrenn nakar oljudropi er vunnin. So skal hesin almenni skarin møta upp hvørjaferð, skal nogv olja pumpast upp bara til lønirnar hjá hesum fólkum.

Til tykkum, sum bjóða til slíkar stevnur, vælsignaðir hugsið tykkum um, tá tit bjóða fólki við.

Tað kann ikki verða meiningin, at vit sum mugu leggja dagar niður og sjálvi gjalda okkara ferðir og uppihald, næstan ikki sleppa framat at tosa við gestirnar, fyri almennum fólkum, sum ongan áhuga hava á hesum økinum.

Annars kom nógv áhugavert fram um, hvat vit kunnu vænta okkum av oljuvinnuni.

Høvuðsboðskapurin var helst: Sláið kalt vatn í blóðið.

Bygdamaður

»Kiliutoq« umvælast á Skála

Kappingin er hørð innan skipasmiðjuøkið. men hóast tað, so eydnaðist Gunnari Mohr, stjóra á Skipasmiðjuni á Skála at fáa tilboðið heim uppá umvæling av gamla »Ángo«, sum Royal Greenland nú eigur.

BEATE L. JENSEN

Í næstu viku fer Skipasmiðjan á Skala undir umvælingararbeiði av grønlendska skipinum »Kiliutoq«.

Umvælingararbeiðið hevur Skipasmiðjan á Skala við stjóranum Gunnari Mohr fingið í harðari kapping við aðrar skipasmiðjur, tí umvælingararbeiði var nevniliga boðið út til allar skipasmiðjur í Norðurlondum.

So skjótt sum Pf. Skipafelagið Føroyar hevur lossað skipið í Tórshavn fyrst í komandi viku, fer »Kiliutoq«, sum er fyrrverandi »Ángo«, inn á Skála. Helst verður hetta týsdagin.

Tað er Royal Greenland, sum eigur skipið, ið er heimahoyrandi í Nuuk.

Væl av arbeiði í 5 vikur

Gunnar Mohr, stjóri, upplýsir at umvælingararbeiðið kemur at taka einar fimm vikur, so nog mikið verður at gera hjá einum hálvthundrað monnum.

Á Skipasmiðjuni á Skála beiða um 40 mans, og tað er nog mikið í tí dagliga. Stjórin hyggur sig í løtuni um eftir fleiri handverkarum innan stál- og maskinsmíð.

– Eingin trupulleiki skuldi verði at fingið fatur á hesum handverkarum, sigur hann.

»Kiliutoq« er fyrsta skipið hjá Royal Greenland, sum nuverandi eigararnir á Skipasmiðjuni á Skála hava fingið til umvælingar frá hesum felag.

– Kappingin innan skipamiðjuarbeiði og skipasmíð er hørð, sigur Gunnar Mohr stjóri, sum ikki vil upplýsa kostnaðin av tí, sum umvælingin skal gerast fyri á Skipasmiðjuni á Skála, har til ber at byggja skip upp í longdini 70 til 80 metrar.



Gloria Kalsø

Kronikkin

Hvat skulu vit brúka oljumilliardirnar til

Peningur frá oljuvinnuni eigur m. a. at nýtast til at varðveita og menna fiskivinnuna, alivinnuna, ferðavinnuna og smáídnaðin, so at vit hava eitt fjøltáttað vinnulív, tá ið oljan er uppi. Hetta kann gerast við at seta pening av til marknaðarføring, nýíløgur, at keypa upp distributiónslið uttanlands, og, at vit keypa okkum inn í útlendska fiski-, alivinnu og møguliga aðrar vinnur. Vit gerast sterkari á marknaðinum, og í longdini før fyri at liva av hesum vinnum

Føroysk virkir eiga longi nú at bjóða seg fram hjá oljufeløgunum

Vit hava lagt Føroya næstu oljuráðstevnu aftur um bak, og stundir hava verið at hugsa um, hvørja vitan vit fingu á hesum ráðstevnum. Eitt er givið, oljufeløgini hava áhuga í Føroyum sum oljuøki. Vónandi megna vit at brúka hendan áhugan soleiðis, at føroyskar fyritøkur kunnu byggja sær ein marknað upp í oljuvinnuni.

Krøvini til fyritøkur, sum veita vørur og tænastur til oljuvinnu á norskum, bretskum ella føroyskum øki, eru tey somu. Meta vit ikki at veita oljufeløgunum, sum bora hjá grannum okkara, tær neyðugu vørur og tænastur, so verður trupult at vera við, tá arbeiði verður á føroyskum øki.

Tí er umráðandi hjá føroyskum fyritøkum longu nú, meðan áhugin hjá oljufeløgunum er har, at bjóða seg fram.

Politisku myndugleikarnir eiga sum skjótast at gera nakrar karmar, soleiðis at føroyskar fyritøkur hava møguleika at menna seg innnan hesa vinnu, sum kann geva okkara vinnulívi eitt bein afturat at standa á.

Við flutningsmøguleikunum og nymótans kunningartøkni er ikki neyðugt einans at hyggja at raevnunum í okkara lítla landi. Eitt vælútbúgvið og rasskt fólk er okkara besta tilfeingi. Tískil hava vit góðar møguleikar at finna aðrar vinnumøguleikar.

Oljan er í grannalagnum, so tað er bara at fara í gongd.

Búskapur okkara ov lítil og viðkvæmur

Um tað hendir, sum næstan øll vænta, at olja er í føroysku undirgrundini, fáa vit heilt aðrar trupulleikar at berjast við.

Búskapur okkara er lítil og viðkvæmur, og tað skal ikki nógv til fyri at avlaga hann. Gitingar hava verið frammi um hvussu nógvan pening, vit fara at vinna úr oljuni. Løgtingsmaðurin Heini O. Heinesen visir í einari blaðgrein á, at um føroyski landgrunnurin kann metast ájavnt við tann hetlendska, so er virðið á gass og olju einar 800-1000 milliardir krónur.

Búskaparfrøðingurin Hermann Oskarsson metir at oljuvinnan fer at leggja 1-5 milliardir eftir í samfelagnum árliga, og, at hesin peningur kann koma at avlaga pris- og lønarstøðið í samfelagnum, og harvið køva allar aðrar vinnur. Hesin ótti er ikki uttan orsøk. Vit hava royndir frá 80'unum, tá ið vit árliga øktu um lántøkuna frá útlandinum við uml. 1 mia. kr., sum førdi við sær øktan aktivitet og mangul uppá arbeiðmegi, og harvið eitt avlagað lønarstøðið í allari vinnuni.

Oljan er eitt tilfeingi, sum ikki endurnýggjast. Um oljan varðar 10 -100-200 ár, vita vit ikki. Tí er umráðandi, at peningur frá oljuni ikki avlagar pris- og lønarstøðið og harvið minkar um kappingarførið hjá útflutningsvinnum okkara, eisini teimum, sum tæna oljuvinnuni.

Hvat skulu oljuinntøkurnar brúkast til?

Vit eiga at gera eina ætlan yvir eitt longri tíðarskeið, hvussu vit brúka hendan pening. Tað, sum fer at koma inn í skatti og avgjøldum frá oljufeløgunum er fyri ein part neyðugt at seta í útlendskar peningastovnar, soleiðis at okkara heimligi búskapur ikki avlagast.

Ein partur kann tó brúkast til at menna og varðveita aðrar vinnur. T.d. setast í grunn ella í eitt felag, sum hevur til endamál at varðveita og menna verðandi - og nýggjar vinnur, sum ikki eru beinleiðis tengdar at oljuvinnuni. Talan kann vera eitt nú um fiskivinnuna, alivinnuna, ferðavinnuna, tænastuvinnuna, skipasmíð og smáídnað.

Marknaðarføring

Tað er ein sannroynd, at vit brúka alt ov lítið av peningi til at vørumenna og marknaðarføra føroyskar fiskavørur. Sum dømi kann nevnast, at ein av orsøkunum til at merkið Royal Greenland er betur kent á brúkaramarknaðinum enn t.d. okkara Faroe, er ivaleyst tann, at grønlendingar nýta einar 30 mió. kr. árliga til marknaðarføring. Skulu vit gera okkum galdandi við lidnum vørum undir føroyskum merki til endaliga brúkaran, er neyðugt at nýta nógvan pening til vørumenning og marknaðarføring.

Keypa upp virkir í øðrum londum

Vit siggja í løtuni, at norðmenn keypa seg inn í alivinnuna í Hetlandi, Skotlandi, Chile og nú í Føroyum. Hetta verður gjørt fyri at sita a einum stórri parti av marknaðinum og eisini fyri at keypa kappingarneytarnar út. Afturat hesum, økir tað um tryggleikan hjá kundunum, við tað at teir vita við vissu, at teir altið fáa vøruna, teir ynskja.

Gongdin á marknaðinum innan matvørur er ein miðsavnan á keyparasiðuni. Vit siggja stórri og stórri part av vørum verða bjóðaðar út gjøgnum stórar matstovu- og handilsketur. Hetta kann geva okkum møguleikar. Eitt nú eiga vit at seta nakað av oljupengunum í tilíkar fyritøkur fyri at faa ávirkan, og á tann hátt betra um møguleikarnar at selja lidnar fiskavørur.

Logistikkur (flutningur v.m.)

Tann mest virðismikla vørran av fiski, vit flyta út, eru feskir fiskaurdráttir. Her er tann vansin, at flutningskervið ikki er nøktandi, soleiðis at vit kunnu veita vørur til marknaðin hvønn dag í vikuni.

Í dag verður nógv tosað um at verða tryggur veitari, tvs. at kunna levera røttu vøruna til rætta tíð. Um vit skulu náa teir røttu prisirnar, er neyðugt at tann føroyski veitarin kann uppfylla hesi krøv, sum í fyrstu syftu tykjast yvirkomilig, men sum í royndir og veru eru ein stórur trupulleiki, ikki bert sjóvegis, men eisini landvegis.

Tí skulu vit brúka nakað av oljupengunum til eitt fullfíggjað flutningskervi frá veitara til brúkara. Hetta verður gjørt við at keypa t.d. útlendsk flutnings- og distrubitiónsfelag.

Nýmótansgerð og nýíløgur

90'ini hava verið tung fyri føroyskt vinnulív. Lítil og eingin peningur hevur verið tí nýíløgur. Tí eru skip og virkir afturúrsilgd tøkniliga.. Kapitalur til nýíløgur og nýmótansgerð hevði gjørt fiski- og alivinnuna meira kappingarføra. Íløgur í materiella og menniskjaliga tøkni hevði gjørt tað meira áhugavert at velja sær lívsstarv innan hesar vinnur.

Trupult er eisini at lúka góðskustýringarkrøvini, sum marknaðarlondini seta. Hetta krevur íløgur, sum kundu verið figgjaðar við oljupeningi.

Útbúgving

Ein onnur treyt fyri at okkara eftirkomarar koma at njóta gott av oljupengunum er, at útbúgvingarøkið verður styrkt, soleiðis at framtíðar føroyingurin í miðal verður best útbúni heimsborgarin. Við nýmótans kunningartøkni og góðum flutningsmøguleikum liggja fordingarnar ikki í, hvar tú býr ella hvussu nógva rávøru, land titt eigur. Tann virðismiklasta rávøran í einum landi, er eitt vælútbúgvi fólk.

Um ongin olja er, Hvat so??

Um vit um nøkur ár finna út av, at eingin olja er í undirgrundini, ja, so hava vit heldur ikki trupulleikar av at finna út av, hvat vit skulu brúka oljupengarnar til.

Vónandi hava føroyskar fyritøkur til ta tíð megnað at brukt tann áhuga, oljufeløgini í dag vísa okkum, til at fáa fótin fastan hjá oljufeløgunum, so vit hóast alt fáa nakað burturúr. Vit hava ikki ráð til at lata nakran møguleika fara framvið uttan at gera brúk av honum.

Men felags fyri báðar møguleikar, við ella uttan olju, er, at vit verða góðkendir á einum høgum altjóða støði.

Tí givið er, at við ella uttan olju, so fara altjóða oljufeløgini at hava stórt virksemi í okkara øki fleiri ár fram í tíðina.